

# Til leigu

Hølini har Rio Bravo og Manhattan hava húsast í miðbýnum, eru til leigu, saman ella hvørt sær.

**Nærri fæst at vita á tlf. 211405**








## Almannastovan søkir eftir barnsburðar-avloysara fyri sosialráðgeva á Arbeiðs-marknaðardeildini at seta beinanvegin ella skjótast til ber

**Arbeiðsmarknaðardeildin**
Arbeiðsmarknaðardeildin á Almannastovuni søkir eftir einum ráðgeva sum barnsburðaravloysara. Starvið er ¾ starv at seta beinanvegin ella so skjótt sum til ber.

**Um deildina**
Arbeiðsmarknaðardeildin hevur til uppgávu at tæna borgarum, sum av sosialum ella heilsuligum orsøkum hava skerdan arbeiðsførleika, og tí mugu hava stuðul fyri at blíva arbeiðsliga og fíggjarliga sjálvbjargin. Á deildini starvast í løtuni 15 starvsfólk, harav 12 eru sosial- og arbeiðsmarknaðarráðgevar. Deildin er landsumfatandi við sæti í Tórshavn.

**Starvið**
Arbeiðs- og ábyrgdarøkið er í høvuðsheitum:
- geva almenna ráðgeving og vegleiðing um stuðulstiltøk innan almannaøkið
- tilráðing og uppfylging í endurbúgvingarmálum, vardum størvum, arbeiðsroyndum v.m.,
- gera ætlanir fyri at fáa fólk út á arbeiðsmarknaðin, herundir avtalur við arbeiðsgevarar
- viðgerð av fíggjarligum veitingum
- gera tilráðingar viðvíkjandi fyritíðarpensjón.

Starvið er avbjóðandi og arbeitt verður í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum uppgávum, har møguleiki eisini er fyri persónligari og fakligari menning.

**Førleikakrøv**
Ert tú sosialráðgevi, ella hevur aðra sosiala ella samfelagsliga útbúgving, og hevur tú hug til sosialt arbeiði og vilt verða við til at hjálpa fólki til eitt virkið arbeiðslív, so er tað tær vit vilja hava fatur á. Royndir í líknandi arbeiði kunnu vera ein fyrimunur.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Størvini eru flokkað í 6. lønarflokki í sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Sendið umsókn við avriti av prógvum, CV o.ø. til:
Almannastovuna
Smyrilsvegur 20
Postsmoga 3096
110 Tórshavn.

Í seinasta lagi 17. sept. 2010, kl. 12.00.
Vinarliga merkið brævbjálvan: "barsilsstarv".

**Nærri upplýsingar**
Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hall Thomsen, deildarleiðara á Arbeiðsmarknaðardeildini telefon 215488, ella til starvsfólkadeildina á telefon 215435.

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA